Løgmálaráðið

Dagfesting: 05.12.2023
Mál nr.: 23/22739
Málsviðgjørt: JAK
Ummælistíð: N/A
Eftirkannað: 14.11.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum vegna nýggja rættargangslóg fyri Føroyar
(Strika tilvísingar til løgreglumál og politimál o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk verður § 2, 2. pkt. strikað, og danski tvíteksturin í lógini verður strikaður.

§ 2

Í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, sum broytt við løgtingslóg nr. 186 frá 7. juni 1958, løgtingslóg nr. 58 frá 22. august 1975 og § 5 í løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, verður § 6, stk. 3 strikað, og danski tvíteksturin í lógini verður strikaður.

§ 3

Í løgtingslóg nr. 29 frá 26. november 1953 um tekniskar innleggingar, sum broytt við lov nr. 186 frá 7. juni 1958 og § 16 í løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993, verður § 8, stk. 2 strikað, og stk. 3 verður eftir hetta stk. 2, og danski tvíteksturin í lógini verður strikaður.

§ 4

Í løgtingslóg nr. 42 frá 17. juli 1959 um flaggið, sum broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 29. desember 1998, verður § 9, stk. 3 strikað.

§ 5

Í løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum, sum broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 10. mars 1992, løgtingslóg nr. 75 frá 23. mai 1997, løgtingslóg nr. 24 frá 12. apríl 2006, løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 173 frá 20. desember 2017 og løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 57, stk. 4 “undir løgreglumálinum” strikað.

§ 6

Í løgtingslóg nr. 78 frá 21. mai 1982 um loðdjórahald, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, verður § 1, 3. pkt. strikað, og danski tvíteksturin í lógini verður strikaður.

§ 7

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, verður í § 215 a, stk. 2 "í politimálum" strikað.

§ 8

Í løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking (Roykilógin) verður í § 14, stk. 3 "og verða at fremja sum politimál" strikað.

§ 9

Í løgtingslóg nr. 60 frá 26. mai 2010 um útleigan av bústøðum (Leigulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 14. mai 2013, løgtingslóg nr. 43 frá 30. apríl 2018 og løgtingslóg nr. 64 frá 9. mai 2019, verður § 31, stk. 3 strikað.

§ 10

Í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 165 frá 12. desember 2020 og løgtingslóg nr. 111 frá 20. oktober 2023, verður § 23, stk. 8 strikað.

§ 11

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022, verður í § 66, stk. 3 "í løgreglumálum" strikað.

§ 12

Í løgtingslóg nr. 88 frá 7. juni 2020 um doping og óreiðiliga ávirkan í ítrótti verður § 5, stk. 4, 3. pkt. strikað.

§ 13

Í løgtingslóg nr. 105 frá 29. juni 2020 um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum, sum broytt við § 40 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 og í løgtingslóg nr. 94 frá 23. mai 2022, verður í § 11, stk. 2 "í løgreglumálum" strikað.

§ 14

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Hin 1. januar 2021 kom nýggj rættargangslóg í gildi fyri Føroyar. Samstundis kom í gildi løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 um broyting í ymsum lógum vegna nýggja rættargangslóg fyri Føroyar (Broyttar greinatilvísingar í serlógum o.a.), sum gjørdi neyðugar fylgibroytingar í aðrari lóggávu.

Ein partur av fylgibroytingunum snúði seg um at strika allar tilvísingar í føroyskari lóggávu til "løgreglumál" og "politimál", tí í nýggju rættargangslógini verður ikki longur skilt millum løgreglumál/politimál og onnur mál. Seinni hevur tað tó víst seg, at 13 ymiskar løgtingslógir framvegis hava tilvísingar til annaðhvørt "løgreglumál" ella "politimál".

Við hesum lógaruppskotinum verður komið afturumaftur, og seinastu tilvísingarnar til "politimál" og "løgreglumál" í føroyskari lóggávu verða strikaðar.

1.2. Galdandi lóggáva

Rættargangslógin fyri Føroyar frá 2021 skilir ikki millum løgreglumál/politimál og onnur mál. Hóast hetta hava fylgjandi løgtingslógir í dag ásetingar, sum annaðhvørt vísa til "løgreglumál" ella "politimál":

1. Løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk
2. Løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995
3. Løgtingslóg nr. 29 frá 26. november 1953 um tekniskar innleggingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um lóggilding av elinleggjarum
4. Løgtingslóg nr. 42 frá 17. juli 1959 um flaggið, sum broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 29. desember 1998
5. Løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020
6. Løgtingslóg nr. 78 frá 21. mai 1982 um loðdjórahald, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995
7. Løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023
8. Løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking (Roykilógin)
9. Løgtingslóg nr. 60 frá 26. mai 2010 um útleigan av bústøðum (Leigulógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 9. mai 2019
10. Løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 12. desember 2020
11. Løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022
12. Løgtingslóg nr. 88 frá 7. juni 2020 um doping og óreiðiliga ávirkan í ítrótti
13. Løgtingslóg nr. 105 frá 29. juni 2020 um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 23. mai 2022

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at strika tilvísingar í føroyskari lóggávu til hugtøk og reglur, sum ikki longur eru galdandi, og sum tískil eru misvísandi. Endamálið við hesum er at bøta um og halda føroyska lógarverkið við líka.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verða ásetingar í 13 løgtingslógum, sum annaðhvørt vísa til "politimál" ella "løgreglumál", broyttar ella strikaðar úr lógartekstinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Broytingarnar, sum lógaruppskotið leggur upp til, hava ongan innihaldsligan týdning.

Lógaruppskotið hevur bara eittans endamál: At strika tilvísingar til hugtøk og reglur, sum ikki longur eru galdandi, og harvið bøta um og halda føroyska lógarverkið við líka.

Av hesi orsøk hevur ikki verið mett neyðugt at senda uppskotið til ummælis. Uppskotið hevur tó verið til viðmerkingar hjá teimum stjórnarráðum, sum varða av løgtingslógunum, ið verða broyttar við lógaruppskotinum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað kann hava ein ávísan umsitingarligan lætta við sær, at tilvísingar, sum eru misvísandi, verða strikaðar úr lóggávuni.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið er ikki viðkomandi fyri nakran millumtjóðasáttmála, sum Føroyar hava tikið undir við.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Evropeiski mannarættindasáttmálin, Hoyvíkssáttmálin og ST-sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, eru ikki viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ongar markaforðingar við sær og hevur onga ávirkan á møguligar verandi markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið ruddar upp í lóggávuni og tryggjar harvið, at tað í løgtingslógum o.tíl. ikki verður víst til hugtøk og reglur, sum ikki longur eru galdandi. Mett verður tí, at uppskotið betrar dygdina á samlaða føroyska lógarverkinum.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Sambært § 2, stk. 2 í løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk skulu mál um brot mót teimum av landsstýrinum kunngjørdu reglunum viðgerast sum politimál.

Við uppskotinum verður § 2, stk. 2 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 2
Sambært § 6, stk. 3 í løgtingslóg um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, skulu mál, har persónar hava gjørt skaða á ella hava gjørt seg inn á skógfriðingarskyldugt lendi, viðgerast sum løgreglumál.

Við uppskotinum verður § 6, stk. 3 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 3
Sambært § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 29 frá 26. november 1953 um tekniskar innleggingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um lóggilding av elinleggjarum v.m., skulu brot á løgtingslógina fara fram sum løgreglumál.

Við uppskotinum verður § 8, stk. 2 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 4
Sambært § 9, stk. 3 í løgtingslóg nr. 42 frá 17. juli 1959 um flaggið, sum broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 29. desember 1998, skulu mál um brot á løgtingslógina viðgerast sum løgreglumál.

Við uppskotinum verður § 9, stk. 3 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 5
Sambært § 57, stk. 4 í løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, kann fortleypandi bót fyrisetast undir løgreglumálinum sum tvingsil at inna skylduna.

Við uppskotinum verður “undir løgreglumálinum” strikað úr § 57, stk. 4.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 6
Sambært § 1, 3. pkt. í løgtingslóg nr. 78 frá 21. mai 1982 um loðdjórahald, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, skulu mál um brot á reglugerðina um loðdjórahald viðgerast sum løgreglumál.

Við uppskotinum verður § 1, stk. 3 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 7
Sambært § 215 a, stk. 2 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, skulu ásetingar í rættargangslógini um krøv til innihaldið í ákæruritum í politimálum, og um at ein skuldsettur ikki hevur skyldu at úttala seg, nýtast á sama hátt fyri sektaruppskot.

Við uppskotinum verður “í politimálum” strikað úr § 215 a, stk. 2.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum politimál og statsadvokatmál.

Til § 8
Sambært § 14, stk. 3 í løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking skulu mál um brot á løgtingslógina fremjast sum politimál.

Við uppskotinum verður § 14, stk. 3 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum politimál og statsadvokatmál.

Til § 9
Sambært § 31, stk. 3 í løgtingslóg nr. 60 frá 26. mai 2010 um útleigan av bústøðum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 9. mai 2019, skulu mál, har útleigari hevur brotið ávísar ásetingar í løgtingslógini, viðgerast sum løgreglumál.

Við uppskotinum verður § 31, stk. 3 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 10
Sambært § 23, stk. 8, 1. pkt. í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 12. desember 2020, skulu mál um brot á løgtingslógina viðgerast sum politimál.

Sambært § 23, stk. 8, 2. pkt. kunnu tey "í bekendtgørelse af lov for Færøerne om rettens pleje nevndu tiltøk í 72. kapitli um at leggja hald á og 73. kapitli um rannsakan ... nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum."

Við uppskotinum verður § 23, stk. 8 strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum politimál og statsadvokatmál.

Til § 11
Sambært § 66, stk. 3 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 89 frá 16. mai 2022, skulu reglurnar í rættargangslógini um innihald í ákæruriti í løgreglumálum og reglurnar um, at ein ákærdur ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, nýtast samsvarandi fyri sektaruppskot.

Við uppskotinum verður "í løgreglumálum" strikað úr § 66, stk. 3.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 12
Sambært § 5, stk. 4, 3. pkt. í løgtingslóg nr. 88 frá 7. juni 2020 um doping og óreiðiliga ávirkan í ítrótti skulu mál, har venjingarmiðstøðir ikki hava hildið kunningarskyldu sína sambært § 5, stk. 1, viðgerast sum politimál.

Við uppskotinum verður § 5, stk. 4, 3. pkt. strikað.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum politimál og statsadvokatmál.

Til § 13
Sambært § 11, stk. 2 í løgtingslóg nr. 105 frá 29. juni 2020 um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 23. mai 2022, skulu reglurnar í rættargangslógini um innihald í ákæruriti í løgreglumálum og reglurnar um, at ein ákærdur ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, nýtast samsvarandi fyri sektaruppskot.

Við uppskotinum verður "í løgreglumálum" strikað úr § 11, stk. 2.

Orsøkin til, at hetta verður gjørt, er, at tað í rættargangslógini fyri Føroyar ikki longur verður skilt millum løgreglumál og statsadvokatmál.

Til § 14
§ 14 er vanlig gildiskomuáseting.

Skotið verður upp, at løgtingslógin skal koma í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, 5. desember 2023

Bjarni Kárason Petersen
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur